# ítróttur

Nr. 203 • leygardagur • 23. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Taptu hóast gott spæl

Føroyska U-17 landsliðið í fótbólti leikti mikudagin sín næsta dyst í EM-undankappingarbólkinum.

Hesaferð vóru tað skotsku vertirnir, sum vóru mótstøðuliðið, og tó at okkara leikarar spældu ein fínan dyst, so endaði tað við skotskum 2-0 sigri.

Skotar komu á odda heilt tíðliga í dystinum, men eftir hetta var tað fyri tað mesta føroyska liðið, sum stóð fyri undirhaldinum. Eitt gott trýst varð fingið í lag oman móti skotska málinum, men hóast hetta eisini viðførdi møguleikar, so vórðu hesir ikki umsettir til mál.

Og tá skotar so nakað inn í seinna hálvleik øktu til 2-0, var dysturin mest sum liðugur fyri okkara viðkomandi.

Seinasti dysturin hjá føroyska liðnum var móti Noreg, sum eisini hevur tapt báðar sínar dystir. Tann dysturin var á skránni fríggjadagin eftir evstamark okkara. Føroyska ferðalagið kemur eftir ætlan heim leygardagin.

**-jm**

# Eingin hondbóltur á Rás1 kortini

**Stjørnan sleppur kortini ikki at senda sínar heimadystir á Televarpinum. Í øllum førum ikki so leingi, sum eingin avtalan við ÍSF fyriliggur um hetta**



*Stjørnan sleppur kortini ikki á Televarps-skíggjan sunnudagin, soleiðis sum tey í Klaksvík annars høvdu ætlað*

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum vit skrivaðu í gjár, so hevði Hondbóltsfelagið, Stjørnan, fingið í lag eina royndaravtalu við Televarpið, har heimadystir felagsins skuldu vísast á Rás1 hjá Televarpinum.

Tá greinin var skrivað í gjár stóð, at bert smálutir nú restaðu, áðrenn alt var endaliga klárt til sendingarnar, men nú vísir tað seg so, at ein av hesum smálutum gjørdist ein beinleiðis forðing. Hvørki Televarpið ella Stjørnan hava nakað loyvi at senda slíkar dystir.

### Einki loyvi

Tað eru í dag bara Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya, sum hava loyvi til at senda frá føroyskum ítrótti, og so er líka mikið, um talan er um beinleiðis sendingar ella forskotnar sendingar, soleiðis sum talan ætlandi skuldi verða um hjá Stjørnuni.

Hetta staðfestir ÍSF-forsetin, Heðin Mortensen, tá vit fríggjamorgunin fingu orð á hann.

– Teir báðir stovnarnir rinda hvør í sínum lagi eina ávísa upphædd. Avtalan aftan fyri hetta ásetur millum annað, at stovnarnir hava frítt at senda frá øllum føroyskum kappingum og kappingum og dystum. Einastu dystir, sum ikki eru fevndir av hesi avtaluni, eru landsdystir. Tá mugu stovnarnir gera avtalu beinleiðis við avvarandi sersombondini. Hinvegin treytar ÍSF sær so ávísar treytir. Eitt nú at smærru ítróttargreinarnar eisini verða røktar. Uppgávan hjá okkum er so at fordeila hesar pengarnar, soleiðis at teir koma føroyskum ítrótti at frama. Fýrkantað sagt, so hevur eingin loyvi at fara inn á ítróttarmarknaðin uttan við loyvi frá ÍSF. Tann reglan er gjørd, soleiðis at vit hava nakrar ávísar karmar at virka undir, sigur Heðin.



*– Er Televarpið áhugað í at gera eina avtalu, so dugi eg ikki at síggja nakran sum helst trupulleika við hesum, sigur Heðin Mortensen, forseti í ÍSF, sum umsitur rættindini til føroyskan ítrótt*

### Nýggj støða

Víðari sigur hann, at hetta er ein avtala, sum í fleiri ár hevur riggað fínt.

– Men nú er tað so broytt við hesi áheitanini um, at sleppa at senda ein hondbóltsdyst forskotið. Tað er jú ein møguleiki, sum ikki hevur verið áður, um Sjónvarpið er útilokað, so talan er um eina nýggja støðu. Vit hava síðani hetta kannað málið, og sum her, so er ikki heimild hjá teimum at senda dystin. Skal hetta kunna lata seg gera, so er neyðugt hjá Televarpinum at gera eina avtalu við ÍSF á jøvnum føti við SvF og ÚF, sigur ÍSF-forsetin, sum samstundis avsannar, at talan skal vera um nakra ekslusiv-avtalu, sum teir báðir stovnarnir hava við ÍSF.

– Hinvegin má eg siga, at eg skilji væl Stjørnuna, nú tey hava arbeitt við hesum møguleikanum. Tað er eitt átak, sum kann geva nakað til felagið, og tó at tað er tungt at fáast við Sjónvarpsframleiðslu, so kann væl vera, at hetta vildi borið til.

Hvørt talan so verður um føroyskan ítrótt á øðrum rásum enn ÚF og SvF framyvir, dugir Heðin Mortensen ikki at svara í løtuni. Men hann leggur dent á, at hann sum so ikki sær tann heilt stóra trupulleikan í hesum.

– Eg rokni við, at hetta er eitt mál, sum fer at verða tikið fram á komandi stjórnarfundi í ÍSF. Og er Televarpið áhugað í at gera eina avtalu, so dugi eg ikki at síggja nakran sum helst trupulleika við hesum, bara tær treytir, sum vit annars seta verða loknar. Um kapping kemur á økinum, so vil hetta helst bara vera føroyskum ítrótti at gagni, so tí hava vit einki ímóti, staðfestir Heðin at enda.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur - Sunset-kappingin**

| Dagur | Kl. | Dystur | |
|---|---|---|---|
| 23.10 | 15.00 | Søljan-VB | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |
| 24.10 | 14.30 | Kyndil-StÍF | Kári Hansen & Dánjal Hansen |
| 24.10 | 14.30 | VÍF-Tjaldur | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 24.10 | 15.00 | Stjørnan-Neistin | Hartvig Joensen & Poli Hansen |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.10 | 16.00 | Kyndil-StÍF | Kári Hansen & Dánjal Hansen |
| 24.10 | 16.00 | H71-Neistin | Kristian Joensen & Karstin Joensen |
| 24.10 | 16.00 | VÍF-KÍF | Hannis Wardum & Uni Wardum |

**Flogbóltur- Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.10 | 14.00 | KÍF-Dráttur | Mjølnir |
| 24.10 | 14.00 | ÍF-Mjølnir | KÍF |
| 24.10 | 14.00 | SÍ-TB | Dráttur |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.10 | 16.00 | Fram-Fleyr | SÍ |
| 24.10 | 16.00 | ÍF-Mjølnir | SÍ |



# Oddabrak í Klaksvík

**Stjørnan tekur á heimavølli móti Neistanum, samstundis sum argastu kappingarneytarnir takast á Giljanesi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Bæði Stjørnan og Neistin hava fult stigatal undan innanhýsis dystinum, sum verður í Klaksvik sunnudagin*

Stjørnan og Neistin eru tvey av trimum liðum, sum hava fult stigatal eftir tey bæði fyrstu umførini, og tí er av sonnum lagt upp til oddabrak, tá hesi bæði lið hittast í Klaksvík sunnudagin. Samstundis er hetta dysturin millum liðið, sum hevur vunnið so nógv teir flestu sigrarnar í føroyskum kvinnuhondbólti og so liðið, sum í løtuni tykist vera í sterkastu maktstøðuni í føroyskum kvinnuhondbólti.

Tað er einki at ivast í, at verjandi meistararnir úr Klaksvík eru favorittar í dystinum. Tær hava longu verið í Vági, har kanska truplasti útidysturin í grundspælinum var uppgávan, og tá tær megnaðu hesa uppgávuna, so er kanska ilt at siga, hvør skal steðga teimum.

Hinvegin er tað ein sannroynd, at Stjørnan í mun til tann dystin ikki hevur Joan M. Joensen. Hon er stødd uttanlands, og sum skilst, so verða tað bert nakrar heilt fáar dystir, sum hon fer at ferðast heim til. Hartil meiddi Beinta Joensen sær hondina í Vági, og tí er ikki víst, at hon fer at spæla sunnudagin.

### Styrkisroynd á Giljanesi

Leygardagin fer triðja liðið, sum higartil hevur fult á vøllin. Søljan hevur í teimum báðum fyrstu dystunum vunnið greiðar sigrar á ávíkavist Tjaldri og VÍF, og tí eru tær í teirri heldur óvandu støðu, at tær eru oddalið í deildini.

Tað er tó ein sannroynd, at teir báðir sigrarnir eru komnir móti liðum, sum undan kappingini vórðu mett at hoyra til veikara endan, og tí kann væl sigast, at hetta verður eitt slag av styrkisroynd hjá Søljuni.

Tí tað er einki at ivast í, at VB – hóast tapið seinast – ætlar sær at vera partur av oddastríðnum aftur í ár. Liðið tykist eisini hava í minsta lagi somu styrki, sum tær høvdu í fjør, men skal oddurin ikki draga alt ov langt frá, so er neyðugt tveimum stigum leygardagin.

Og so verða eisini tveir aðrir dystir sunnudagin. Í Havn hittast Kyndil og StÍF, og eftir at strandakvinnur fingu síni fyrstu stig seinasta vikuskifti, er spurningurin, hvørt tað hesaferð skal gerast Kyndil, sum sleppur á talvuna.

Í Vestmanna hevur stigaleysa VÍF heimadyst móti somuleiðis stigaleysa Tjaldri. Botndystur er ikki akkurát tað, sum kvinnurnar í Vestmanna eru vanar við, men tað er so støðan hesaferð, og so er spurningurin, hvørt tær megna at taka alt móti Tjaldri, sum tey bæði fyrstu umførini hevur tykist sum veikasta liðið í kappingini.

# Spenningur í Havn

**Strandingar vitja hjá Kyndli sunnudagin, og tað tykist vera dysturin um, hvør skal renna í hølunum á Vestmenningum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Hóast bert tvey umfør eru leikt av kappingini, so hava bæði Kyndil og StÍF givið tekin um, at tey ætla sær at vera við, har sum tað er stuttligt at vera*

Tey bæði, Kyndil og StÍF, verða bæði roknaði sum møguligir kandidatar til avgjørda oddastríðið hetta kappingarárið. Kyndil, sum hevur at kalla alt fólkið frá í fjør tókt, er helst favoritturin í hesum spælinum, nú strandingar tykjast satsa alt upp á egna framleiðslu í ár, men hóast tað, so hevur StÍF víst, at knotur enn eru í monnum. Móti VÍF vóru tað soleiðis bert brotskøstini, sum vóru á muni.

Kyndil hevði eina einki serliga premieru, tá teir máttu lúta fyri KÍF, men móti Neistanum seinasta vikuskiftið sýndu teir, at teir hóast alt ætla sær at vera við, har sum tað hendir í ár.

### VÍF heldur fram

Einasta liðið, sum enn hevur fult stigatal, er VÍF, og tað tykist væl hugsandi, at hetta eisini er galdandi eftir sunnudagin. KÍF kemur á vitjan, og tó at hesir ofta hava argað vestmenningarnar, so hevur tað mest sum hvørja ferð verið VÍF, sum hevur drigið longra stráðið í grannadystunum.

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið verður í Hoyvíkarhøllini, har Neistin vitjar hjá H71. Einki er at ivast í, at lagið eftir tey bæði fyrstu umførini er sera ymiskt í teimum báðum legunum. Hoyvíkingarnir taptu tepurt fyri VÍF í fyrsta dystinum, men seinasta vikuskiftið vundu teir burtur úr KÍF og prógvaðu sostatt, at teir í ár ætla sær nakað longur upp á talvuni, enn teir hava verið seinnu árini. Neistin hevur hinvegin sum einasta drigið púrasta svart higartil. Vónirnar undan árinum mundu annars ikki vera heilt lítlar, men tvey stórtap fyri StÍF og Kyndli hava uttan iva gjørt, at hesar vónir eru lækkaðar. Um tær so fara at vaksa aftur eftir vikuskiftið fer tíðin at vísa.

## SMS fer á HB-búnan

Tey bæði seinastu árini hevur tað verið Føroya Bjór, sum hevur verið høvuðsstuðulin hjá HB, men hetta tykist nú at vera søga.

SMS sendi hóskvøldið út tíðindaskriv, har sagt verður, at teir fara at skriva undir sponsorsáttmála fríggjadagin seinnapartin, beint áðrenn stóri vinningurin á lutaseðlunum hjá HB-stuðlum verður drigin.

Tað stendur ikki í tíðindaskrivinum, men tað ljóðar fyri vist, at talan verður um sponsorsáttmála, sum ger SMS til høvuðsstuðul hjá HB tey bæði komandi kappingarárini.

Hetta er ein leiklutur, sum SMS ongantíð áður hevur havt í ítróttarhøpi. Áður hevur Miklagarður verið millum sponsorarnar hjá onkrum felagi, og seinasta árið hevur Sunset gjørt nógv um seg sum stuðul í kvinnuhondbólti, men hetta verður so fyrsta ferðin, at SMS sjálvt verður høvuðsstuðul hjá ítróttarfelag.

**-jm**

## Kaupthing stuðlar VÍF

SPONSORAVTALA
*tíðindaskriv frá VÍF*

Vestmanna Ítróttarfelag (VÍF) hevur gjørt nýggja stuðulsavtalu við Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F, ið inniberð, at Kaupthing verður høvuðsstuðul hjá VÍF komandi 2 árini

Kaupthing hevur seinastu árini verið ein av stuðlum felagsins og eru partarnir komnir ásamt um, at Kaupthing verður høvuðsstuðul felagsins frá og við kappingarárinum 2004/05.

Stuðulsavtalan verður undirskrivað av báðum pørtum í Ítróttarhøllini í Vestmanna, sunnudagin 24. oktobur, aftaná mansdystin millum VÍF og KÍF.